O sæla stór   A-dur

```
        A                     D         Hm
1. O sæla stór, mær Harrin gav,
      E          E7          A
við trúgv á Hansar´ orð.
  A                 D          Hm
Í kærleika til barn sítt sær
      E      E7        A
tað føðir við sítt borð.
         A                    Cis
Hans náði nýggj er hvønn ein dag.
   D                 A       E7
Í ævir eg skal sanna tað.
      A             D   Hm   E     E7      A
Halleluja halleluja halleluja vár Gud.
```

2. Hann slíkan kærleik vísti mær,
Eg tí nú elski Hann.
Reint brúðarlín Hann keypti mær
tí gleðast nú eg kann.
Tá heimsins gleði endar her,
tað besta víni Hann mær ber.
Halleluja halleluja halleluja vár Gud.

3. So myrkt tað mangan tykjast kann,
Og sól er handan skýggj.
Í heiminum mangt tyngja kann
til trúðarsólin nýggj,
til heimlandið mær vísir veg
har myrkrið aldrin hóttir meg.
Halleluja halleluja halleluja vár Gud.

4. Ja tað er sæla longu nú,
Sum vin Hann kenna her.
Hvør verður tá í dýrdarskrúð,
mót heimlandi tað ber.
Vit gleðast skulu alla tíð,
Ei endar sælan himli í !
Halleluja halleluja halleluja vár Gud.

Ums: Gudna Midjord